UTTAN ÚR HEIMI

## Ætlaðu at drepa Blair

Fyri einum ári síðani ætlaði ein víðgongdur muslimskur felagsskapur at beina fyri bretska forsætisráðharranum, Tony Blair, men bretska løgreglan avdúkaði ætlanina, skrivar franska vikublaðið Le Figaro Magazine.

Sambært blaðnum fekk bretska løgreglan snevilin av ætlanini í mai í fjør, tá løgreglan kom fram á nøkur skjøl, sum vístu, hvat felagsskapurin hevði í kvittanum. Í skjølunum stóð millum annað, at ætlanin var at væta ein saks við eiturevninum ricin, og síðani skuldi onkur stinga Blair við saksinum.

Franski yvirgangsserfrøðingurin Roland Jacquard sigur við Le Figaro Magazine, at bumbuatsóknirnar í London í næstsíðstu viku vísa, at teir muslimsku yvirgangsfelagsskapirnir í Evropa eru ikki viknaðir, sum tey flestu hava hildið, men at teir tvørturímóti eru til reiðar at gera um seg, tá teir fáa boð um tað.

## Ráðharri lagdur undir svik

Mjølið í posanum hjá nýggja stýrinum í Irak tykist ikki vera stórt reinari enn tað hjá tí gamla stýrinum. Í hvussu er ikki, tá tað snýr seg um svik.

Í síðstu viku kom fram, at varaverjumálaráðharrin, Ziad Cattan, hevði fingið sekkin, tí illgruni var um, at hann skal hava stungið ovurhonds nógvar almennar pengar í sín egna lumma. Harumframt skkal hann hava givið skyldfólki og vinmonnum væl av pengum úr almenna iraklska ríkiskassanum, og tilsamans hevur hetta kostað ríkiskassanum fleiri milliardir krónur, skrivar Reuters.

Sum varaverjumálaráðharri hevur Ziad Cattan havt ábyrgdina av øllum handli hjá iraksku hermegini, og framferðin hevur ikki altíð verið líka reiðilig. Eitt nú er avdúkað, at herurin hevur keypt nakrar tyrlur úr Pólandi fyri 600 milliónir krónur. Tyrlurnar skuldu eitast at vera nýggjar, men tað vísti seg, at hetta vóru 30 ára gamlar sovjetskar tyrlur, og at prísurin var langt niðan fyri tær 600 milliónirnar, sum skjølini vístu. Pengarnir, sum herurin rindaði ov nógv, fóru í lumman hjá varaverjumálaráðharranum og onkrum hjálparmanni hansara. Avdúkingin hevur havt við sær, at myndugleikarnir kanna arbeiðsháttin hjá fleiri øðrum starvsfólkum í verjumálaráðnum í Bagdad, skrivar Reuters.

## Rúsevni í tinginum

Leiðslan í ES-tinginum er illa við, eftir at eitt týskt sjónvarpslið hevur funnið leivdir av rúsevninum kokain í fleiri enn 40 ymsum støðum í tinghúsinum.

Frágreiðingin hjá formansskapinum er, at tað munnu vera ungfólk, sum hava verið í starvsvenjing, sum hava brúkt kokain, men tað eru minni enn so øll, sum góðtaka ta frágreiðingina. Svenski professarin Fritz Sørgel sigur við Aftonbladet, at tað er ov lætt at geva ungfólki skyldina. Hann heldur tvørturímóti, at tað eru embætisfólk hjá tinginum sjálvum, sum hava brúkt kokain, meðan tey hava verið til arbeiðis.

Tíðindamaðurin hjá týska sjónvarpinum Sat1 bað eina rannsóknarstovu kanna rúsevnið, sum hann fann í tinghúsinum, og svarið var, at tað var kokain. Sjálvur hevur tíðindamaðurin greitt frá, at hann fann rúsevnið í fundarhølum, skrivtsovum og í sjálvum tingsalinum.

## Nógvar stakar kvinnur

Keypmannahavn hevur ongantíð havt so nógvar stakar kvinnur sum nú, vísa tey nýggjastu tølini.

Hagtølini hjá donsku hagstovuni vísa, at í løtuni eru 22.844 stakar kvinnur í Keypmannahavn, og tað er tvær ferðir so nógv sum fyri tíggju árum síðani. Heilt neyvt er vøksturin 93,3 prosent. Hjá monnunum er gongdin tann sama, sjálvt um vøksturin ikki er so stórur har. Í dag eru 36.028 stakir menn í danska høvuðsstaðnum, og tað er umleið 40 prosent fleiri enn í 1995, sigur hagstovan.

Granskarin Birthe Linddal-Hansen sigur við Politiken, at kvinnur hava munandi betri fíggjarligar umstøður at klára seg einsamallar í dag enn fyri tíggju árum síðani. Harafturat velja nógvar kvinnur at bíða við at fáa sær børn, sigur hon. Birthe Linddal-Hansen leggur afturat, at tað er serliga í Keypmannahavn, at talið á støkkum kvinnum er vaksið nógv. Í hinum stóru býunum er gongdin als ikki so týðilig.



*Fylgisveinamynd av tropisku ódnini Emily, júst sum hon fór inn yvir Yucatan-nesið í Meksiko*

# Emily herjar Meksiko

**Meiri enn 60.000 fólk vórðu flutt burtur, áðrenn tropiska ódnin Emily rakti meksikonsku strondina í gjár. Haðani fer hon til USA**

ÓDN
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Emily rakti strondina á Yucatan-nesinum í Meksiko gjáramorgunin. Meksikonsku veðurmenninir høvdu boðað frá, at vindferðin fór at koma upp um 200 kilometrar um tíman, og at tað fór at regna sera illa.

Á Yucatan-nesinum eru fleiri væl umtókt frítíðarstøð so sum Cancun og Playa del Carmen, og teir meksikonsku myndugleikarnir gjørdu av at flyta nógv fólk burtur haðani, áðrenn ódnin bar við land. Sambært løgregluni eru meiri enn 60.000 fólk flutt burtur av vandaleið, og teirra millum eru nógv útlendsk ferðafólk. Harumframt valdu umleið 50.000 útlendsk ferðafólk at fara heim í úrtíð, og umleið 340 flogfør hava flutt ferðafólkini til USA, Kanada og Evropa, skrivar AP.

Veðurmenninir siga, at Emily fer at missa nakað av sínari megi, meðan hon er yvir Yucatan-nesinum, men at hon fer at mennast aftur, tá hon heldur leiðina fram út yvir Meksikanska Flógvan, tí har er sjógvurin sera heitur í løtuni. Næsta land, sum fær vitjan av henni, verður amerikanski staturin Texas, og har eru myndugleikarnir longu farnir undir at fyrireika seg til at taka ímóti henni. Roknað verður við, at Emily kemur til Texas í morgin.

# Muslimar í Bretlandi hóttir við hevnd

**Víðgongdir høgrafelagsskapir og teir sokallaðu "hooligans" hótta við at hevna bumbuatsóknirnar í London**

HEVND
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Bæði Tony Blair, forsætisráðharri, og løgreglan í London hava lagt dent á, at bumbuatsóknirnar í næstsíðstu viku vóru vendar ímóti øllum tí bretska samfelagnum, og at eingin einstakur samfelagsbólkur kann revsast fyri tað.

Kortini sigur blaðið The Guardian seg hava frætt, at víðgongdir høgrafelagsskapir eru farnir í samgongu við teimum tiltiknu hooligans-fótbóltsáskoðarunum, og at teir ætla at søkja at muslimskum moskum í London.

Á alnótini verða fótbóltshooligans hjá feløgunum Arsenal, West Ham, Millwall og Chrystal Palace og nýnazistar bidnir um at standa saman í bardaganum ímóti muslimunum, skrivar The Guardian.

Hetta er ikki fyrstu ferð, at víðgongdir høgrafelagsskapir og hooligans í Bretlandi standa saman. Eitt nú hendi tað fleiri ferðir í áttatiárunum, og tiltøkini vórðu altíð vend ímóti fólki av fremmandum uppruna.

Bretski tjóðskaparflokkurin British National Party brúklar nú bumbuatsóknirnar fyri at tekkjast veljarunum. Á einari plakat hjá flokkinum er ein mynd av bussinum, sum bleiv sprongdur í luftina næstseinasta hósdag, og niðan fyri myndina stendur "Nú er tíðin komin, til at fólk eiga at lurta eftir BNP". The Guardian skrivar, at flokkurin hevur fingið eitt sindur størri undirtøku síðani atsóknirnar, men allir hinir flokkarnir hava fordømt, at flokkurin ger sær dælt av einum tílíkum sorgartilburði.